

*Høvuðsleiklutirnar sum Nikolaj og Julie hava Peter Mygind og Sofie Gråbøl*

# Nikolaj og Julie – ein nútíðar kærleikssøga

**Soleiðis er eitt púra vanligt parlag í nítiárunum. Alt er so gott, størv, hús, yndisbarnið og dreymastarvið. Men ferðin er ov høg, og alt endar galið**

Ein kærleikssøga so sonn, at hon kundi verið um teg . Søgan er um parlag, um single-lív, vinarlag og um lívið tvørtur um ættarmørkini í dagsins Danmark. Um kærleikans vegir og loynistíggir – um vón og um dreymar, ið koma og fara, meðan lívið heldur fram.

– Nikolaj og Julie er ein dramarøð, sum vendir sær til alla familjuna. Ein nútíðar søga um kærleika og um tey tøttu sambond millum menniskju, býtt út á trý ættarlið – millum børn, foreldur og ommur og abbar. Tað snýr seg um, at vit øll annaðhvørt tað vit hava verið ígjøgnum ella allarhelst skulu ígjøgnum, sigur Ingolf Gabold, dramaleiðari hjá Danmarks Radio, sum vónar, at »Nikolaj og Julie« fer at klára seg eins væl og »Ferðaliðið« hjá Danmarks Radio, sum hevur vunnið altjóða virðislønir.

Tá Nikolaj og Julie hitta hvørt annað, vita bæði við eitt, at tey hava hitt tann einasta eina. Tey verða skotin hvør í øðrum, kærleikin veksur alsamt, og so endar tað skjótt við brúdleypi, dreymahúsi, yndisbarni og øllum tí, eitt nútíðar eydnuríkt lív krevur. Men síðani koma tey til strævna arbeiði við at halda alt við líka.

– Vit eru í nøkrum a la filmin »Italiensk for begyndere« – I Feel good-sjangran, men eg vil fegin leggja dent á, at her er okkurt bæði at grína og gráta eftir. Tað er dramaið, sum er í hásæti, sigur Ingolf Gabold við pressutænastuna hjá Danmarks Radio.

Nikolaj og Julie eru umgyrd av eini fastari kjarnu av vinum, hvørs lív er fløkt inn í annara. Nikolaj, Frank og Philip eru gamlir vinir síðani skúlan. Saman hava teir eitt minni reklamuvirki, har arbeiðsbýtið er greitt: Philip er á pappírinum stjóri og skal fáa kundarnar »í hús«, men kanska brúkar hann tíðina heldur til at renna eftir konufólki. Frank, sum er grannskoðari úr Jútlandi, skal halda skil á óstøðugu fíggjarstøðuni. Nikolaj er teksthøvundur og tann kreativi. Teir stovnaðu virkið, tí Nikolaj vónaði at fáa persónligt og kreativt frælsi, Philip sá møguleikan fyri prestisju og pengum, meðan teir báðir fingu sannført Frank.

Frank er giftur við Karinu, sum er vinkona hjá Juliu, og tað var tann vegin, at Nikolaj og Julie hittust á fyrsta sinni. Julie hevur fyri stuttum fingið starv í einum advokatvirki, har Karina eisini arbeiðir sum skrivari, og hon er stuðul hennara, bæði til arbeiðis og í lívinum annars, tá alt gongur galið…

Parturin sunnukvøldið komandi er um føðingardagin hjá Emmu, sum skal haldast, men hvussu? Nú eru nakrir mánaðir farnir síðani Nikolaj og Julie fór hvørt frá øðrum.

Men júst nú hevur Julie sett sær fyri, at Stefan skal hitta Emmu og vinirnar. Mitt í øllum verður Nikolaj noyddur at fara eitt ørindi til London fyri at hála ein handil í land – hann lovar at vera heima aftur til føðingardagsveitsluna, men so er tað líka trupulleikin við gávuni.

Philip rennur seg aftur í trupulleikar við Iben, meðan Frank má royna at greiða Jonatan frá nøkrum, tey vaksnu hava fyri, og sum børn ikki skilja.

